MARKAMÓTSNEVNDIN

Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting 27. juni 2025

Avgerð viðv. búplássi til Parkinsonsjúkling

Avvarðandi kommunala samstarv heitti, við skrivi dagfest 27. januar 2025, á Markamótsnevndina um at taka støðu til, hvør eigur ábyrgdina av, at veita búpláss til borgara við Parkinsonsjúku.

Talan er um ein borgara, sum er komin langt í sínari sjúku og hevur tíðarbil har borgarin "frystir". Hesar løtur megnar borgarin so at siga einki og hevur tá bæði tørv á hjáveru og røkt. Borgarin megnar annars, við løttum stuðli, at taka hond um egnan tørv, hóast tað tekur tíð. Borgarin óttast fyri at koma í hesar støður, har borgarin "frystir" og víst verður á, at serlæknar hava mett, at borgarin ikki kann útskrivast til heimið.

Kommunala samstarvið hevur gjørt eina meting í sambandi við visitatión, har teirra meting er, at tørvurin er ein blanding av hjáveru og røkt, har hjáveran fyllir uml. 70 %.

Málið hevur verið til viðmerkingar hjá Almannaverkinum, sum upplýsir, at tey hava veitt umlætting eina viku um mánaðin í november og desember. Og eisini hava tey veitt stuðulstænastu í heiminum nakrar tímar um vikuna. Ætlanin var at veita dagtilboð hjá Almannaverkinum, men orsaka av innlegging á sjúkrahúsi, bleiv hetta ikki til nakað.

Markamótsnevndin hevur eisini biðið sjúkrahúsverkið' um upplýsingar um støðuna hjá borgaranum. Sjúkrahúsverkið vísir á, at tað ikki er gjørd demenstest av borgaranum og at tey ikki hava illgruna um symptomir upp á demens. Tey vísa á, tað er trupult at meta um røktartørvin, tí borgarin hevur góðar dagar har borgarin er sjálvhjálpin og aðrar dagar har viðkomandi einki megnar.

Út frá upplýsingunum í málinum sæst, at partarnir eru samdir um, at borgarin hevur tørv á búplássi, men eru ósamd um, hvør eigur at veita hetta búpláss.

Viðgerð av málinum

Markamótsnevndin hevur í øðrum málum mett um markamótið millum, nær Almannaverkið eftir forsorgarlógini(nú almannalógini) hevur ábyrgd av búplássi og nær ábyrgdin er kommunal eftir lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Markamótsnevndin hevur áður tulkað lógargrundarlagið soleiðis, at røktarkrevjandi undir fólkapensjónsaldur, ið sum undantak kunnu fáa røktarpláss eftir § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., eru borgarar við progressivum og degenerandi sjúkum sum alzheimer og onnur sløg av demensi ella sclerosu á seinni stigi. Hetta verður mett sum sjúkur, ið eldri menniskju vanliga fáa, og sum við atliti av tørvi seta sjúklingarnar, sum eru undir fólkapensjónsaldur, í líknandi støðu sum teir, ið eru fólkapensjónistar.

Í viðmerkingunum til § 5, stk. 4 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. varð undir "Markamót millum bútilboð, veitt sambært hesi lóg, og bútilboð, veitt sambært forsorgarlógini(nú lógini um almannatrygd og tænastur) nevnt, at "Í heilt serligum føri kunnu borgarar undir 67 ár fáa bústað á røktarheimi ella eldrasambýli. Her verður serliga hugsað um fólk við kroniskum sjúkum s.s. alzheimer, Sclerosu ella aðra neurologiska sjúku, sum viðføra, at tey eru røktarkrevjandi, ella fólk, sum eru doyggjandi, sum ynskja at fáa pláss á einum røktarheimi."

Í viðmerkingunum til § 14, stk. 2 var á líknandi hátt sagt: "Ásetingin inniber, at røktarheim ella eldrasambýli í serligum førum kunnu hýsa yngri borgarum, sum eru røktarkrevjandi og sum tørva røkt alt samdøgrið. Tað kann t.d. vera borgari sum fær eina demenssjúku áðrenn pensjónsaldur."

Lógaruppskotið setti tískil ikki sum treyt, at talan skuldi vera um demenssjúku, alzheimer ella sjúku, ið gomul menniskju vanliga fáa. Sjúkur sum alzheimer, sclerosa og aðrar neurologiskar sjúkur vórðu tiknar sum dømi um tað, sum serliga verður hugsað um í sambandi við, at fólk undir 67 ár gerast røktarkrevjandi á ein hátt, sum gevur teimum rætt til pláss eftir § 14, stk. 2 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Tá ið langt er útligið við sjúkuni, so eru ávís líkheitstekin millum Parkinson og Sclerose. Talan er um progredierandi sjúkur. Parkinsonsjúka á hesum stigi er av slíkum slag, at tað er stórur tørvur á kønari sjúkrarøkt. Útlitini fyri Parkinson er at man verður meira og meira óhjálpin. Og út frá upplýsingunum í málinum, so hevur borgarin tíðarskeið, har hann einki fær gjørt og hevur tørv á hjáveru og røkt, og at hesin tørvur verður størri og størri.

Niðurstøða

Vísandi til omanfyri nevndu viðurskifti metir Markamótsnevndin, at tað er kommunan, sum eigur at veita borgaranum búpláss.

Markamótsnevndin heitir eisini á myndugleikarnir um at taka støðu til markamót 3, har tað stendur at ein arbeiðsbólkur verður settur at gera neyðugar vegleiðingar til hetta markamótið og nevndini kunnugt er hetta ikki gjørt.

Anna Dam, forkvinna

Jan Sjóstein

Katrin Danielsen